TING-HELLAN



*Tað er so tætt millum teir stóru flokkarnar, at eingin kann kenna seg tryggan áðrenn valið týsdagin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Endaspurturin verður avgerandi

**Sambandsflokkurin stendur til at missa sítt fólkatingsumboð, meðan hinir tríggir stóru flokkarnir eru í beinhørðum og tøttum stríði um teir tveir sessirnar. Tað vísir veljarakanning hjá Gallup**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

## Veljarakanningin

**Í døgunum frá 1. til 5. februar spurdi Gallup Føroyar 633 respondentar í eini veljarakanning til Fólkatingsvalið 8. februar fyri Útvarp Føroya. Vanliga verður sagt, at óvissan við eini veljarakanning kann verða upp í 2-3 prosent, men úrslitið av kanningini var hetta:**

| | |
|---|---|
| **Javnaðarflokkurin** | **24,2%** |
| **Tjóðveldisflokkurin** | **23,6%** |
| **Fólkaflokkurin** | **23,4%** |
| **Sambandsflokkurin** | **20,8%** |
| **Sjálvstýrisflokkurin** | **4,0%** |
| **Miðflokkurin** | **3,1%** |
| **Hin Stuttligi Uttanflokkurin** | **1,0%** |

Tað er einki avgjørt í í valinum til fólkatingið, og seinastu dagarnir áðrenn valið verða avgerandi fyri, hvørjir tveir flokkar fáa umboð í danska tingið.

Tað vísir ein veljarakanning, sum Gallup Føroyar, hevur gjørt fyri Útvarpið. Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin liggja stavn um stavn í kappróvingini um fólkatingssessirnar, og tað verður endaspurturin, sum verður avgerandi fyri valið.

Sambandsflokkurin, sum seinastu árini hevur havt annað umboðið, stendur til at missa tað, men flokkurin er ikki langt aftan fyri hinar tríggjar stóru flokkarnar.

### Teir smáu og stuttligu ongan kjans

Teir smáu flokkarnar hava ongan kjans at vinna sær umboð í Fólkatinginum, vísir veljarakanningin hjá Gallup.

Hóast flokkarnir hava tosað um bæði undur og realistiskar møguleikar fyri at náa fólkatinginum, so vísir veljarakanningin, at Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin ikki fáa meira enn millum trý og fýra prosent av atkvøðunum.

Teir stuttligu í Uttanflokkinum liggja enn longri aftan fyri við bara einum prosenti av atkvøðunum. So tað kann væl vera, at Johan í Kollafirði fær fólk at flenna í valstríðnum, men hann fær tey ikki at velja sín flokk í sama mun.

### Einki er avgjørt

Úrslitið av veljarakannigini er so tætt, at høvuðsboðskapurin má vera, at teir fýra stóru flokkarnir eru í sera tøttum stríði um fólkatingssessirnar.

Tað er altíð ávís hagfrøðislig óvissa við einari kanning, og tá ið tað er so lítil munur millum tríggjar flokkar, kann bara tann hagfrøðisliga óvissan venda eitt sindur upp og niður upp á úrslitið.

Skrivstovan hjá Javnaðarflokkinum sendi mánamorgunin út skriv, har hon vísti á, veljarakanningina kann geva veljarunum eina skeiva fatan av, at valstríðið var vunnið, og at bara óvissan um kanningina kundi broyta úrslitið.

– Tað er altíð ein óvissa við eini slíkari veljarakanning, og kanngínin vísir bara, hvat veljararnir hildu júst tann dagin, teir vóru spurdir. Síðani hevur ein stórur veljarafundur verið, og valstríðið er annars í hæddini, og tað kann broyta úrslitið, sigur Ellindur Egilstrøð, stjóri á Gallup Føroyar.

– Kanningin vísir, at tað er sera tætt millum teir stóru flokkarnar, og at einki er avgjørt frammanundan. Tað kann tilvild og smálutir, sum koma at avgera valið, sigur hann.

# Nú ræður um frið og støðufesti

**Nú mugu gamlar sambandsdygdir verjast. Vit hava havt nokk av turbulensi í føroyskum politikki seinastu árini. Nú má friður aftur fáast millum partarnar í ríkisfelagsskapinum, sigur Edmund Joensen, sambandsmaður**

FÓLKATINGSVAL
*Edvard Joensen*

Tað ræður um hjá øllum sambandsveljarum at taka veljarakanningina í álvara og taka aftur tað, sum mist er, sigur Edmund Joensen, fyrrverandi formaður Sambandsfloksins, í viðmerking til veljarakanningina, sum sigur Sambandsflokkin fara at missa fólkatingsmannin.

– Nú er hatta bara ein kanning og skal takast sum ein sovorðin, sigur Edmund Joensen. Men hon er so ein ábending um, hvat kann fara at henda. Og í mugu vit fora fyri.

Hann er ikki nøgdur við útlitini, nú Sambandflokkurin stendur fyri einum markantum falli í atkvøðutalinum til Fólkatingsvalið.

Sambandsflokkurin er sambært Edmundi Joensen einasta alternativið til tann turbulens, sum hevur verið at sæð í politiska umhvørvinum hesi árini, fullveldissamgongan hevur staðið fyri politikkinum.

Nú er ein sterk og arbeiðsfør samgonga fingin at virka, og tí er alneyðugt, at vit ikki lata danir fáa fatan av, at tey, sum myndaðu fullveldistíðina, aftur koma til valdið í Føroyum, sigur Edmund Joensen.

Hann sær fyri sær, at fólk sum Høgni Hoydal, Anfinn Kalsberg og Helena Dam á Neystabø, sum øll standa væl í sínum flokki eftir veljarakanningini at døma, koma á Fólkating. Seinast nevnda sum eykavald fyri Jóannes Eidesgard, sum ikki tekur sæti, tí hann er løgmaður, sigur Edmund Joensen. –Tað er lætt at ímynda sær, at danskir politikarar aftur fara at síggja tað stríð, sum var millum Føroyar og Danmark, tá hesi myndaðu føroyskan politikk, kykna uppaftur, um so verður at tey sleppa á Fólkating, sigur hann.



*Sambandsflokkurin er einasta alternativið til tann turbulens, sum hevur verið í føroyskum politikki. Nú má friður og støðufesti aftur fáast í viðurskiftini millum partarnar í ríkisfelgsskapinum, sigur Edmund Joensen, fyrrverandi formaður Sambandsfloksins*

– Her er bara eitt alternativ, sum kann tryggja frið og semju í ríkisfelagsskapinum. Og tað er Sambandsflokkurin, er Edmund Joensen fullvísur í.

# Leggið ga

**Formaður Miðflokksins heldur ikki, at fólk skulu taka seinastu veljarakanningina so bókstaviliga. Heldur skulu tey leggja gamlar vanar av og velja øðrvísi enn vanligt**

FÓLKATINGSVAL
*Edvard Joensen*

Jenis av Rana, formaður i Miðflokkinum, heldur ikki, at veljarakanningin skal takast so bókstaviliga. Í øllum førum eiga